# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Russar og vit

Føroyingar og russar hava langar traditiónir fyri samstarvi. Eitt er tað, at vit hava fiskað í sjónum hjá hvørjum øðrum. Men vit hava eisini samstarva í aðrar mátar. M.a. hava russisk skip í mong ár verið góðir kundar hjá skipasmiðjum og havnum her á landi.

Tað var so tann tíð undir Kalda krígnum, at summir føroyingar royndu at seta kílar millum føroyingar og russar. Vit minnast niðurgerandi og hálvrasistisku greinarnar í Dagblaðnum móti russum um somu tíð sum russisk skip góvu eitt nú skipasmiðjuni á Skála nógv arbeiði.

Tann tíðin er tíbetur søga. Men. Tað er líkasum, at vit hava ikki heilt megnað at slept okkara fjaldu "agressiónum" móti russum tilvitað ella ótilvitað.

Vit kenna syrgiligu søguna um russiska skipið, sum liggur svínabundið í Kollafirði. Tvey russisk skip vórðu tikin í ein útsynning úr Føroyum. Russar hildu tó uppá, at brotini vórðu avmarkað og ikki tilvitað. Endin var tó tann, at fútin gjørdi arrest í tí eina skipinum. Síðani fór reiðarríið á heysin og hevur skipið ligið her síðani. Ein sorgarsøga. Ístaðin fyri at geva skipunum eina bót og lata tey leys vóru tey afturhildin sum grovastu sjóræn-arar og endaligur úrskurður fall ikki fyrr enn eitt ár seinni. Ein seigpíning av russum, sum var total óneyðug.

Nú hendi so tað, at russiskir sjómenn vórðu dømdir fyri tjóvarí í Føroyum. Talan var um virði fyri nakrar fáar túsund krónur. Dómurin var harður má sigast, russararnir vóru útvístir úr Føroyum.

Nú skulu vit ikki sáa iva um tær lógir, sum okkara myndugleikar ganga eftir. Men tú hevur eina kenslu av, at skipanin eru alt ov burokratisk og ómenniskjanslig. Tað kann ikki kann vera rætt at fella so harðar dómar yvir útlendingar. Er ikki eisini nakað, sum eitur at stinga fingurin í jørðina – at viga fyrimunur og vansar við at fella ov harðar og strangar dómar?

Vit áttu at kunna fingið nógv meira burtur úr samvinnuni við Rusland. Okkara politisku myndugleikar hava sovið í tímanum. Hóast russiski konsulin í Føroyum hevur víst vegin og aftur og aftur gjørt myndugleikarnar varugar við teir fyrimunir økt samstarv við russar kundi fingið, so hevur eingin lurtað. Atli Dam, sáli var eitt undantak. Hann hevði tað, sum ein landsleiðari eigur at hava: lurtaði og dugdi at fanga signalini frá vinnulívi og brúkti sítt treiskni, dirvi og klókskap til at knýta nýggj sambond. Nakað undanfólk hansara ikki hava megnað í sama mun.

Nú kom so hendingin við Skálabergi. Lítil ivi er um, at myndugleikar í Ruslandi hava brúkt bæði skitnar og tvitnar metodur móti føroyingum. Hvat veruliga hendi í hesum máli vita vit tó framvegis ikki, um partur av skyldini lá her heima ella um hetta var eitt takk fyri seinast frá russum í kjalarvørrinum á málinum um tiknu russisku trolararnar á sinni.

Lat okkum fáa fund á hægsta stigi við russar, har vit seta út í kortið av nýggjum eina samvinnu, sum kann vera ein vinnarastøða fyri bæði londini. Tað er ikki ein løtt og einføld uppgáva, men vit eiga at royna. Og hetta gerst bara, um vinnulívið og myndugleikar virka saman og draga eina og somu línu.

**Sosialurin**

## The Rise of The Creative Class

TÓRBJØRN JACOBSEN



Kenda bókin hjá Richard Florida hevði helst sæð øðrvísi út, um høvundurin hevði havt vitjað í Føroyum, fyri at bókin var skrivað. Hansara tesa er, at vøkstur gerst veruleiki, har hin kreativi klassin velur at seta seg niður, heldur enn, at hin kreativi klassin setur seg niður, har ið vøksturin er gingin undan. Florida kendi ikki ódefinerliga faktorin, sum er ókendur allar aðrar staðir enn júst í Føroyum, Fólkaflokkin – Radikalt Sjálvstýri.

Vit, sum hildu og halda, at eitt uttanríkisráð er neyðugt í strembanini fram ímóti eini føroyskari republikk, fegnast sjálvandi hvørja ferð okkurt forkunnugt kemur undan væðingini uttan av Tinganesi. Tað er tó langt ímillum snapsirnar, serliga eftir at ambitiónsniveau´ið foyktist út ígjøgnum sama lyklarhol, sum Høgni Hoydal varð lempaður út ígjøgnum fyri hálvum øðrum ári síðan av javningunum, ið eru farnir at ræðast alt sum bara ber brá av føroyskum tjóðskapi. Nú ræður tað mest um at spæla fólk í húsi, at sleppa at sita uppi í donsku kringekjuni. Við reimum og selum.

Í gjár var tíðindafundur hildin í øðrum potensi. Fiskimála- og uttanríkisráðharrin høvdu rulkað kloddar sínar saman, og við hesi pallseting ynsktu teir at tosa beinleiðis við alla tjóðina. Breaking news við lít, Danmark hevði útdelegerað Føroyum evsta sessin í fiskivinnubólkinum í norðurlandaregi, meðan teir sita við samlaða formanssessinum í 2010. Hugsaði við mær sjálvum, at nú er soðið hjá samgonguni tunt. Hendan bótasúpanin hevur verið so oftani úti í hjallinum og vent, eftir at vera uppafturkókað upp í saman aftur, at hon við tíðini er farin at kennast sum gallsúrur laki undir gómanum. Vælindini hveppast við so hvørt sum droparnir seta at annars harðføra ganginum.

Pætur í Funningi og Ormur bóndi runnu mær til hugs. Ormur av Ytra Skála mundi vera ein karismatiskur og jovialur maður, og sjálvt um kantarnir ikki vóru heilt so reinir, so var hann kendur fyri at vera gestablíður. Táið funningsbóndin sá sítt egna mark á oyrunum á sviðnu seyðarhøvdunum yviri á Ytra Skála, var honum tó ovboðið. "Seigt er slíkt", mælti hann fram fyri seg. "Et tú, væl er kókað", svaraði Ormur. Endareplikkin hjá Pæturi var ta ferðina: "Tungt at eta sítt og tað stolið."

Soleiðis fyrikoma hesir trællir Fólkafloksins mær í hesi stund. Málið um hendan formanssessin í fiskivinnubólkinum eigur hvørgin ministarin minsta vetið í. Táið eg á várið í 2008 fekk at vita, at hetta kundi gerast ein møguleiki, táið danir fingu formanssessin í Norðurlandaráðnum, kom hugskotið upp, og eftir nakað av samskifti við danska ráðharran, ið varðar av fiskivinnumálum, varð avrátt, at Føroyar skuldu eiga hendan sessin, sum tíðindafundur nú hevur verið um. Hetta er CHE-samgongunnar verk í øllum lutum, tí tykist tað heldur enn ikki ósmæðið av Vestergaard og Niclasen, - líka so nonsjalant at rista breiðar álir av herðum annara.

Tað snildasta við tíðindafundinum var tó, at øll kundu fylgja honum á alnótini. Eitt tøkniligt framlop. Sambært Vágaportalinum vóru tað tó bara 189 fólk í øllum heiminum, ið gjørdu brúk av hesum forkunnuga møguleikanum. Tað var keðiligt, táið Fiskimálaráðið nú einaferð hevði gjørt sær so óvanliga stóran ómak, fyri at føroyingurin skuldi gerast partur av teirra strabadsum og tunga gerandisdegi. Eftir øllum at døma hevur Jacob Vestergaard boðið hesa nýggju tænastuna út í almennum útboði, tó at eg ikki havi sæð lýsingina í bløðunum, og júst her er tað, at Richard Florida hevði fingið eina heilt nýggja vitan inn um húðina og handan skallabeinini, hevði hann vitjað Føroyar. Helst hevði hann tá bøtt um fyrstu útgávuna, tí tá hevði hann havt vitjað í landinum við tí óvanliga faktorinum, góstreidaranum, har tilvildin, nepotisman og skipaða kaosið kann spæla øllum eitt puss. Helst var tað tað sum hendi, táið ein kendur íverksetari, sum er formaður í almenna Vinnuframagrunninum og skrivari hjá tingbólki Fólkafloksins vann entreprisuna ígjøgnum Netvarp.fo hjá Spf. Globi, um at senda beinleiðis frá tíðindafundinum úr Fiskimálaráðnum hjá Fólkaflokkinum.

Ei dáni í at vit eru fremstir í broddi fylkingar í øllum lutum. Vit eiga ein kreativan klassa, sum ber av øllum. Sum ongin logikkur og rasjonalitetur miðvíst kunnu elta. Hesin pallsetur seg sjálvan líkamikið hvussu oyramarkið lýtur út á sviðna høvdinum, sum vappar og smírist í bráðkomnari deyðsangist í trognum. Nú bíða vit bara eftir at Netvarp.fo hjá spf. Globi fer at varpa beinleiðis frá confidentiellu og toppseacraðu fundunum í Uttanríkisráðnum. Tað verður undirhald fyri hvørja skattakrónu. Ein avanserað útgáva av krógva og blunda. Neyðugt er í hvussu er ikki at fara yvir um ánna eftir vatni, tað snýr seg bara um, at ein tingbólkaskrivari tekur ein av mongum tútahúgvum niður av knakanum.

Jesaja spámaður skrivar um mannin, ið rann eins og runnur úr turrari jørð. Vit eru nú vælsignað við einum merkisverdum kreativum klassa, ið hevjar seg framúr og uppum alt, sum higartil hevur verið monnum kunnugt. Her fer ivaleyst við vissu at blíðka fyri hugaðum monnum. Hesin snapsurin verður heilt víst ikki hin seinasti í røðini hjá nýsamanriknu og gávaðu tríeinigheitini hjá radikalu sjálvstýrarunum. Sanniliga er hvør dagur ein nýggj og spennandi uppliving í hesum fjarskotna landi, og bara Guð má vita, hvat dagurin ímorgin man eiga í sær av duldum mátti og kreativum formati. Tað spyrst um livst.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.